# Dagarnir fastlagdir



*Í minsta lagi seks landsdystir verða á skránni hjá A-landsliðnum komandi ár, og verða tríggir av hesum í komandi EM-undankapping*

**Fótbóltssambandið hevur gjørt uppskot til fótbóltskalendaran fyri komandi ár**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Fótbóltssambandið hevur nú gjørt eitt fyribils yvirlit yvir, hvussu leikdagarnir í ymsu fótbóltskappingunum verða komandi ár.

## Byrja í mars

Av heimligu kappingunum er kappingin um løgmanssteypið sjálvandi hin fyrsta, sum farið verður undir, og verður hetta longu 2. mars, tá fyrstu innleiðandi dystirnir skulu fáast frá hondini.

Feløgini í fyrstu deild koma tó ikki í steypakappingina fyrr enn í bólkaspælinum, og byrjar hetta 16. mars. Fjórðingsfinalurnar verða leiktar dýra biðjudag, 26. apríl, og longu tveir dagar seinni er fyrra hálvfinalan á skránni. Seinna hálvfinalan verður 12. mei, meðan sjálvur finaludysturin eins og í fjør verður leiktur á ólavsøku.

Sjálv landskappingin byrjar fyrsta vikuskiftið í mei, og so verður spælt hvørt vikuskiftið fram til fyrsta vikuskiftið í juli, tá farið verður í summarfrí.

4. august verður so aftur lagt til brots, og 5. oktober verður føroyameistarin 2002 so endaliga kosin

## Landsliðið

Seks dystir eru settir á skránna hjá landsliðnum, men møguliga verður hetta talið økt við einum afturat. Tað er nevnliga so, at tann fyrsti av hesum verður á árligu venjingarleguni hjá landsliðnum, og er hendan ásett til dagarnar, 3. – 16. februar. Undanfarin ár hevur talan verið um fleiri dystir á venjingarleguni, og møguleikin fyri, at soleiðis verður aftur, skal als ikki útihýsast.

Annars skulu Føroyar, sum vit áður hava skrivað, spæla landsdyst móti Íslandi, tá ein nýggj fótbóltshøll í Íslandi skal innvígast. Hesin dysturin er ásettur at verða hin 2. apríl.

ASnnars verður hampuliga friðarligt hjá landsliðnum fram til komandi heyst, tá farið verður í holt við EM-undankappingina. Sum upphiting til hetta verður heimadystur móti Liktenstein á skránni tann 21. august. Hetta er seinni av tveimum vinardystum, og vunnu Føroyar tann fyrra í Liktenstein 1-0.

Hvørji mótstøðuliðini í undankappingini verða, er enn ikki fastlagt, men UEFA hevur longu ásett sonevndu landsdystarterminirnar. T.v.s. hvørjar dagar dystir skulu leikast, og hetta fer at líkjast trimum altjóða dystum til okkara menn. Ein í september og tveir í oktober.

Vit loyva okkum at gita, at talan verður ikki um heimadyst í oktober, men at ein slíkur verður leiktur leygardagin, 7. september. Soleiðis verður talan um dupult-umfar í oktober, tá 12. og 16. eru ásettir sum leikdagar. Vónandi fara hesir at hilnast okkara monnum betri, enn hesi dupult umførini áður hava gjørt.

Viðmerkjast kann afturat, at til kokmandi undankapping verða tíggju bólkar við fimm liðum í hvørjum. Hetta gevur átta dystir til hvørt landið, og skulu Føroyar so eftir øllum at døma spæla fimm undankappingadystir í 2003, harav tríggir verða á heimavølli.

# Spennandi Dartkapping

**Dartkapping varð hildin í B36-húsinum um vikuskifti**

DART
*Tíðindaskriv*



*Stinnastu menninir í einmansleiki. Aftast f.v. Jens Petur Poulsen, Flemming Hansen, Remy G. Hansen og Jógvan Pauli Joensen.*

Fyri fyrstu ferð hetta kappingarárið kappaðust kvinnurnar eisini. Í einmansleiki vann Astrun Lützen og hon vann eisini tvímansleikin saman við Katrini Poulsen.

Í B-bólkinum hjá monnunum leiktu Jógvan Pauli Joensen og Heini Heinisen seg fram til finaluna. Jógvan Pauli hevði í hálvfinaluni vunnið 5-3 á Gunnari Mouritsen, meðan Heini hevði vunnið 5-3 á Eyðuni Samuelsen. Jógvan Pauli legði hart út og kom skjótt uppá eina 5-1 leiðslu. Men so komu ivaleyst nervar uppí hjá Jógvan Paula, tí hóast hann hevði møguleikan at avgera øll settini, so vann Heini fimm sett á rað og harvið finaluna 6-5.~

## Favorittarnir fullu

Í A-bólkinum fullu onkrir av favorittunum enn einaferð tíðliga í kappingini. Henrik Pedersen varð aftur hesaferð sligin út í fyrsta umfari og Petur Grønagarð snávaði í øðrum umfari.

Allir hálvfinalistarnir vunnu greitt sínar fjórðingsfinalur, men eisini í hálvfinalunum vóru sigrarnir púra greiðir. Alvin Egholm vann 5-1 á Flemmingi Hansen og Remy G. Hansen vann 5-0 á Jens Peturi Poulsen. Vóru hálvfinalurnar ójavnar, so var heldur meir spenningur í finaluni. Remy vann finaluna 6-4.

## Stór undirtøka

Í tvímansleiki luttóku 16 pør og tað er tað mesta í langa tíð, og eisini hesaferð var tað okkurt par, sum vanliga ikki spælir saman, ið kom langt í kappingini. Flemming Hansen/Jens Petur Poulsen hava verið tað støðugasta parið higartil og teir komu eisini í hálvfinaluna uttan trupulleikar. Teir hittu í hálvfinaluni Henning Thomsen/Petur Grønagarð. Hetta gjørdist ein sera góður dystur. Flemming og Jens Petur løgdu seg á odda 3-1, men Henning og Petur svaraðu aftur og komu upp á 3-3. Løtu seinni var støðan 4-4, og tí skuldi avgerðin falla í 9. settinum. Her vóru Flemming og Jens Petur stinnari, og teir tryggjaðu sær tí finaluplássið við at vinna 5-4.

Jackie Joensen/Bjarni í Stórustovu høvdu vunnið 4-3 á Henrik Pedersen/Poul Poulsen í eini sera spennandi fjórðingsfinalu. Men í hálvfinaluni, har mótstøðumenninir vóru Jan Midjord/Remy G. Hansen, megnaðu teir ikki at gera so nógv um seg. Jan og Remy gjørdu skjótt av og vunnu 5-2.

Finalan gjørdist sera spennandi og til tíðir eisini væl leikt. Finalurnar verða leiktar best av 11 settum, og eins og í undanfarnu kapping mátti øll 11 settini spælast fyri at finna ein vinnara. Tað vóru ongantíð meir enn tvey sett á muni og tá komið var til 11 sett, stóð nógv á monnum. Nógvir nervar vóru uppi í og allir fýra misnýttu ein møguleika at avgera dystin, áðrenn Flemming setti pílin í double og tryggjaði sær og Jens Peturi sigurin. Balslev og Spf. Høgni Mikkelsen lótu steyp og heiðursmerkir til vinnararnar.

Hetta var sístða kappingin hesumegin ársskiftið. Skráin, styrkilistin og úrslit annars eru at síggja á tekstvarpsíðu 230 og á heimasíðuni www.dartfo.dk.



*Tvímansleikur menn. Afv: Jens Petur Poulsen, Flemming Hansen, Remy G. Hansen og Jan Midjord. Ffv: Henning Thomsen, Petur Grønagarð, Bjarni í Stórustovu og Jackie Joensen.*



*Fremstu kvinnurnar í kappingini. Aftast f.v: Eyðna Vestergaard, Joan E. Thomassen, Gunnbjørg Dam og Ásvør Højgaard. Ffv: Katrin Poulsen, Astrun Lützen og Aslaug Jensen*

## 1/4-finala

Ein av fjórðingsfinalunum í Coca-Cola kappingini hjá monnum verður á skránni í kvøld, mikukvøldið. Í høllini á Hálsi í Havn fara Neistin og Kyndil at dystast um, hvør teirra fær pláss í hálvfinaluni.

Dysturin byrjar kl. 19.30.

-jm



FLÚGV BÍLIGA
til Danmarkar
Til Keypmannahavnar og aftur, til Billund og aftur.
Frá 10. desember til 6. januar
1500,-
Ferðirnar skulu vara millum 7 og 21 dagar. Ferðirnar skulu bíleggjast minst 7 dagar frammanundan og kunnu ikki broytast ella endurrindast. Allar flogferðir hjá Atlantic Airways geva EuroBonus stig. Ferðaavgjaldið sum er kr. 365,- kemur afturat prísinum. Fæst á øllum ferðaskrivstovum kring landið.
SAS EuroBonus
ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo

20 tons útróðrarbáturin
M/B »EDVØR«
til sølu
Báturin er útgjørdur til línu- og snellufiskiskap og hevur automatiska línuskipan við splittara og egningarmaskinu og 8 stokkar á 3 m, uml. 10.000 húkar, 8 stk. svenskar el-snellur, BJ.5000.
Báturin er 19,81 tons til støddar og hevur eina maskinorku uppá 300 hk Volvo Penta. Annars er øll vanlig nautisk útgerð umborð, m.a. ein nýggjur Furuno radari. Umborð eru eisini 14 fiskakør, 6 á dekkinum og 8 í lastini, á 350 kg.
Báturin hevur fiskiloyvi í bólki 4A og bankaloyvi. Higartil eru brúktir 15 dagar.
Eru tygum áhugaður, so ring á tlf. 289603, 371999 ella 371603 og fá fleiri upplýsingar.
Knútur Nygaard
Tvøroyri

Neil Brophy
er á Caféini til og við sunnudagin, har hann syngur um sínar ferðir kring knøttin, um góðar løtur v.m.
Tilboð í desember
Gløgg & holukøkur
kr. 40,-
livandi tónleikur
CAFÉ NATÚR
Tlf. 31 26 25
Sosialurin 311820



**Leiðarastarv**

# Rokskaparleiðari

Søkt verður eftir leiðara til roknskapardeildina á Strandfaraskipum Landsins.

### Uppgávur hjá roknskapardeildini

Høvuðsuppgávan hjá roknskapardeildini er at veita eina úrslitagóða búskaparfyrisiting, herundir samskipa, viðlíkahalda og menna búsksaparstýringina. Aðrar uppgávur eru:

- Fyriskipan av roknskaparverkinum
- Rakstrar-, íløgu- og likviditetsætlan, herundir lantíðarætlanir
- Roknskaparlig skráseting
- Roknskaparframløga, mánaðar- og ársroknskapir, herundir budgeteftirlit og játtanarroknskapir.

### Uppgávur hjá leiðaranum

Høvuðsuppgávurnar hjá roknskaparleiðaranum verða:

- ráðlegging, fyriskipan, raðfesting, samskipan og eftirlit í sambandi við búskaparstýringina
- Seta upp fíggjarætlanina við atliti til:
  - avmarking og útdelegering av avgerðarábyrgd
  - samskifti og samskipan millum stjóra og deildarleiðarar
  - motivatión fyri at røkka tilætlað úrslit
- Framløga av standard- og specialrapportum
- Menna innanhýsis mannagongdir í sambandi við gerð av fíggjarætlan, roknskapi o.ø.
- Fyriskipa upplæring, undirvísing og fakliga menning av starvsfólkum á deildini
- Uppgávu- og starvslýsingar á deildini.

Í løtuni verður arbeitt við at umleggja búskaparskipanina hjá SL. Henda uppgáva verður ein spennandi avbjóðing fyri komandi roknskaparleiðaran, sum fær ein týðandi leiklut og ábyrgd fyri verkætlanini.

Eisini verður ætlaða byggingin av suðuroyarferjuni ein spennandi avbjóðing fyri roknskaparleiðaran.

### Førleikakrøv

- Vinnu- og handilsútbúgving frá hægri lærustovni ella líknandi.
- Royndir innan edv á høgum brúkarastøði
- Royndir innan fíggjarstýringarskipanir, so sum Navision Financials
- Royndir í projektleiðslu ein fyrimunur
- Málrættaður og arbeiðir analytiskt
- Góð leiðslu- og samstarvsevni
- Góð evni at orða seg bæði skrivliga og munnliga á føroyskum, donskum og enskum.

### Setanartreytir

Talan er um eitt leiðarastarv við stórum og spennandi avbjóðingum, har leiðarin fær ábyrgdina av at umsita og menna eina týdningarmiklað funktión. Starvið gevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

Starvið verður sett sambært avtalu, og er lønt í 36. lønarflokki sambært tænastumannalógini, tó uttan at starvið er tænastumannastarv. Eftirlønartrygging fylgir við starvinum.

### Umsóknir

Umsókn við próvskjølum skal sendast til:

***Strandfaraskip Landsins***
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 17. desember 2001. Tað er ynskiligt, at tann, sum settur verður, kann byrja skjótast gjørligt.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Reidar Nónfjall, stjóra.

Tlf. 343000 ella e-postur: ren@ssl.fo

*Høvuðsuppgávan hjá SL er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá SL javnvigar við yvir 150 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 11 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

STRANDFARASKIP LANDSINS







